# Telefonprát eins hættisligt og rúsevni

**Hóast tú nýtir handfría fartelefon er tað hættisligt at tosa í telefon, tá tú koyrir. Tað er telefonprátið í sær sjálvum, sum er órógvandi og ikki telefonin**

FERÐSLUTRYGD

Ein nýggj ansvekjandi kanning, sum er gjørd á Utah University í USA vísir, at hóast tú nýtir høvuðlurt er tað eins hættisligt at tosa í telefon meðan tú koyrir, sum tá tú koyrir við kenning.

Vandin fyri at enda í eini ferðsluvalukku er nøkulunda tann sami, sum um tú drekkur tríggjar ella fýra øl, áðrenn tú setir teg við róðrið.

Úrslitini av kanningin vísa nevniliga, at tað er eins hættisligt at tosa í telefon undir koyringini, sum at koyra við einari promillu upp á 0,8. Tað er líka mikið, um tú hevur fartelefonina í hondini ella nýtir høvuðlurt.

Kanningar hava eisini fyrr víst, at tað er telefonprátið í sær sjálvum, sum er órógvandi og ikki telefonin.

– Eins og við at koyra rúsaður, setir tú bæði teg sjálvan og onnur í lívsvanda við at tosa í telefon meðan tú koyrir, sigur maðurin aftanfyri kanningina, David Strayer professari í sálarfrøði.

Við í kanningini vóru 40 sjálvboðnir bilkoyrarar, sum vórðu royndir í einum framkomnum simulatori.

Teir vóru í bilinum fýra ferðir hvør undir ymiskum umstøðum: Tá teir høvdu drukkið, tá teir vóru edrúir og tá teir koyrdu við ávikavist handfríari og ikki handfríari fartelefon.

Bæði teir, ið høvdu drukkið og teir, sum tosaðu í telefon, høvdu longri um at bremsa og koyrdu ótryggari.

Kanningin varð almannakunngjørd í seinastu útgávuni av vísindaliga ritinum The Journal of the Human Factors and Ergonomics Society.



*Líka mikið, um tú hevur fartelefonina í hondini ella nýtir høvuðlurt, so er tað eins hættisligt at tosa í telefon undir koyringini, sum at koyra við einari promillu upp á 0,8. Tað vísir ein nýggj kanning, sum er gjørd á Utah University í USA*

*Mynd: Álvur Haraldsen*









Marknaðarrák

# Fed bleytari enn væntað

Hósdagin í farnu viku hækkaði amerikanski tjóðbankin, Fed, leiðandi rentuna úr 5,00% í 5,25%. Hetta var 17. hækkingin á rað síðan juni 2004, tá hon bert var 1,00%. Marknaðirnir væntaðu hesa hækking, og størsti spenningurin var tí um tað, sum stóð í tíðindaskrivinum eftir rentufundin. Har var tjóðbankin óvæntað bleytur í viðmerkingunum um komandi rentuhækkingar. Dentur varð lagdur á, at nú tekur bankin eisini atlit til búskaparvøksturin, sum er í ferð við at slakka eitt sindur av. Áður hevur Fed bert tosað um vandan fyri prísvøkstri. Marknaðirnir tóku hetta sum tekin um, at Fed skjótt fer at gevast við rentuhækkingunum, og hetta fekk partabrøv at hækka.

## Lánsbrævarentur støðugar

Lánsbrævarenturnar hava enn einaferð verið støðugar hesa farnu vikuna. 10-ára danska rentan er soleiðis næstan óbroytt á 4,10%. Seinastu sløku tríggjar mánaðirnar hava lánsbrævarenturnar flutt seg lítið. 10-ára rentan hevur ligið millum 3,90%-4,10%.

## A. P. Møller – Maersk niðurmettið úrslitið

Týsdagin í farnu viku lækkaðu partabrøvini í A.P. Møller – Maersk umleið 10%, tá felagið niðurmettið útlitini. Lægri farmagjøld, trupulleikar við samanleggingini við P&O Nedlloyd og minkandi marknaðarpartar nevnast sum høvuðsorsøkirnar.

Jaliga partabrævagongdin seinastu vikuna kann verða tekin um, at lækkingin á partabrøvum er um at vera av á hesum sinni. Hetta er tó ov tíðliga at siga við vissu, men roknskaparkunngerðirnar, ið koma í næstum, kunnu fara at staðfesta jaligu gongdina.

## Hesa vikuna

Hendan vikan verður eisini hendingarík á virðisbrævamarknaðunum. Størsta einstaka hendingin verður amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri juni, sum kemur fríggjadagin. Hon var sera veik seinast, og áhugi er tí fyri, um hon man fara at vísa ein sterkari arbeiðsmarknað hesuferð. Um so er, stuðlar tað undir partabrøvum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 582,75 | -1,7% |
| JPY | 5,08 | -0,3% |
| GBP | 1.073,76 | -0,6% |
| NOK | 93,46 | -0,7% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,26 | -0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 108,76 | 2,3% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

*Vika 27 2006*